# Krepputloysnin hevur skapt eina nýggja kreppu

**Tað er ongin meining í, at tað stóra flakavirki í Vági stendur stongt, sigur Jákup Joensen í Lorpa, sum bygdi tað. Men kortini skilir hann Fiskavirking væl**

FISKIVINNA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Krepputloysnin við Fiskavirking og Framtaksgrunninum vóru krepputloysnir, men tær vóru ikki avtiknar, tá ið kreppan var av og tað hevur ført til eina nýggja kreppu í Suðuroy, sigur Jákup Joensen í Lopra*

– Kreppuloysnirnar, sum vórðu settar í verk fyri 10 árum síðani, hava nú skapt eina nýggja kreppu.

Tað heldur Jákup Joensen í Lopra, sum bæði er gamal í garði sum vinnulívsmaður og sum eisini hevur verið løgtingsmaður.

Hann sipar til loysnina við Fiskavirking og Framtaksgrunninum, sum vórðu settar í verk fyri at fáa endurrreisa Føroyar eftir kreppuna í nítiárunum.

Tað var Jákup Joensen, sum bygdi tað stóra flakavirkið í Vági, men hann hevur ikki so øgiliga nógvar viðmerkingar til støðuna.

– Fiskavirking og Framtaksgrunnurin vóru kreppuloysnir. Men ein kreppuloysn eigur at verða tikin av, tá ið kreppan er av.

Tað vóru hesar kreppuloysnirnar ikki og tí hava tær skapt eina nýggja kreppu, í hvussu so er í Suðuroy.

Ì kjalarvørrinum á kreppuloysnunum við Fiskavirking og Framtaksgrunninum, var Polarfrost í Vági stongt og tað hevur verið at kalla stongt síðani.

Samstundis gjørdu politikararnir harafturat av at steðga beinleiðis flutninginum ímillum Suðuroynna og Skotland, so at allur útflutningur úr Suðuroy mátti til Havnar og tað var fíggjarligur steinnur oman á byrðu hjá vinnulívinum í Suðuroy.

– Tað er ongin meining í, at tað stóra flakavirkið í Vági skal standa stongt.

Men hann heldur tað er ov lætt at siga, at tað er bara at loysa Flakavirkið í Vági burturúr Fiskavirking.

– Fiskavirking hevur eina fyritøku, sum skal rekast. Og er tað so, at Fiskavirking og Framtaksgrunnurin eru vinnurekandi burturav og bara skulu hugsað um úrslitið á niðastu reglu, má sigast at teir hava borið seg skilagott at. Tí letur tað stóra flakavirkið í Vági upp, fáa teir ein harðan kappingarneyta um rávøruna og tað er onki at siga til, at teir ikki vilja skaffa sær ein slíkan kappingarneyta.

Hann vísir eisini á, at virkið í Vági er stórt og tað er ómetaliga tungt at reka, so tað krevjast sera stórar nøgdir av fiski til, fyri at fáa lønandi rakstur í tað.

– Og Fiskavirking ivast helst í, um tað ber til at fáa slíkar mongdir av fiski, at lønandi rakstur í virkið.

– Men nakað annað er tað, at loysnin við Fiskavirking skuldi skuldi verið avtikin, tá ið kreppan var av.

– Men tað var hon ikki og úrslitið er, at virkið í Vági stendur stongt og kreppa er framvegis í Suðuroy og serliga í Vági, sigur Jákup Joensen.

Hann sigur at orsøkin til at tað mangan gongst so illa, eru tey vánaligur karmarnar við flutningskostnaði og -møguleikum.

– Men at tað mangan gongst so illa, skapar eisini ótryggleika og ger tíverri, at mong missa álit á, at tað ber til. Men fáast karmarnar í rættlag, skuldi taðborið einsvæl til í Suðuroy sum aðrastaðni, tí vinnulívsfólk í Suðuroy eru líka dugnalig sum aðrastaðni.

### Sølan haltar

Annars evur hann varhugan av, at søluapparatið hjá føroysku fiskivinnunu haltar, so tað munar.

– Vit eru í teirri støðu, at vit hava nógvar seljarar. Tí havi eg varhugan av, at seljararnir mangna undirbjóða hvønn annan fyri at sleppa av við fiskin og tað kann aldrin vera rætt.

– Skal ein seljari sleppa av við fisk, kann hann ikki trýsta prísin upp. Hann verður tvørturímóti noyddur at trýsta prísin niður fyri at tekkjast keyparanum og tað er heilt øvugt av tí, tað átti at verið.

Hesi støðu vóru føroyingar í fyrr, men tá var niðurstøðan, at neyðugt var at samskipa søluna fyri at fáa sum mest burturúr og tí varð Fiskasølan stovna.

– Er tað nakað, sum skuldi verið samskipað í eina eind í Føroyum, er tað sølan avfiski, sigur Jákup Joensen.

# Nýtt flakavirki letur nú upp í Suðuroynni

**Jákup í Lopra hevur hvørki mist vónina ella álitið á framtíðina. Nú fer hann at lata nýtt flakavirki upp í Lopra og hann hevur rættiliga góðar vónir um at tað ber til**

VINNULÍV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú letur skjótt eitt nýtt flakavirki upp í Suðuroynni.

Tað er Jákup Joensen í Lopra, sum er gamal í garði í føroyskum vinnulívi, ið nú fer at lata flakavirki upp í heimbygdini, Lopra.

Hóast hann er komin væl til árs, hevur hann hvørki mist vónina ella álitið á, at tað ber til at hava fiskivinnu í Suðuroy.

Hann sigur, at væntandi fer flakavirkið at lata upp í vár.

Í fyrstuni væntar hann, at tað verður arbeiði til eini 20 fólk á virkinum. Men flakavirkið er væl útgjørt og hevur møguleika at virka rættiliga nógvan fisk. So



*– Jákup Joensen í Lopra fer nú aftur undir flakavirki í Suðuroy og hann hevur rættiliga góar vónir um at tað fer at bera til*

hvussu nógv fólk, arbeiði verður til, veldst alt um, hvussu tað fer at liggja fyri at keypa fisk og at sleppa av við virkaðu vøruna.

Jákup í Lopra eigur fimm flakalinjur, sum kunnu setast upp á virkinum. Av teimum er ein linja til kongafisk, so virkið er væl útgjørt.

Hann ætlar at leggja største dentin á fesk fløk, men tað ber eisini til at frysta fløk, tí virkið hevur orku at frysta eini 5-7 tons um samdøgurið.

Flakavirkið verður í húsinum, sum Vesturland eigur á bryggjuni í Lopra. Har var flakavirkið til fyri stuttum, tá ið virkið varð leigað út.

Men tað virksemið helt uppat og síðani hevur húsið staðið tomt.

Men tað ætlar Jákup í Lopra ikki, at tað skal gera longi afturat og í seinastu hevur hann arbeitt við at fyrireika eitt nýtt flakavirki í húsinum.

Men hann ásannar, at hann er ikki heilt ungur longur, er farin um tey 75, so hansara lutur verður mest at fáa gongd á, so fer hann at lata tað upp í hendurnar á yngri kreftum at reka víðari.

Nú verður bíðað eftir at fáa góðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og tað væntar Jákup Joensen í Lorpa at fáa í næsta mánað. Tíðindini um, at Jákup Joensen fer undir flakavirki í Lopra eru ikki farin afturvið borðinum hjá teimum arbeiðsleysu í syðru helvt í Suðuroy.

– Heilt nógv fólk hava ringt og biðið um arbeiði, men enn fái eg onki gjørt uttan at skriva tey upp, sigur hann.

### Rættiliga góðar vónir

Jákup í Lopra sigur, at hann hevur góðar vónir um, at tað skal bera til, ikki minst tí at útgangsstøðið er gott.

– Vit eiga húsið og tað er ongin skuld í tí. Tí kostar tað okkum ikki serliga nógv at byrja og tað er eitt heppið útgangsstøðið at hava, sigur hann.

Hann sigur, at tað kostar einar 50.000-70.000 krónur um árið í leigu, streymi, olju, trygging og øðrum, at hava húsið standandi og tí hevur hann hugsað um, hvussu tað ber til at útvega húsinum inntøkur.

– Nú hevur virkið verið flakavirki og tað mest nærliggjandi var at halda fram við tí.

Sostatt keypti Jákup Joensen tær báðar flakamaskinurnar, sum stóðu inni eftir teir, sum róku flakavirki til fyri stuttum, men síðani hevur hann eisini keypt tríggjar flakalinjur afturat frá Sancy Seafood í Vági.

Hann hevur góðar vónir um at tað ber til og hann hevur eisini samband við keyparar uttanlands, sum eru sinnaðir at taka vøruna. Men hann heldur, at ein týðandi forteyt fyri at hava flakavirki í Suðuroy, er, at farmaskip siglur beinleiðis úr Suðuroy niður á meginlandið í Evropa skal fara úr Suðuroy fríggjakvøld, sigur Jákup Joensen.

Hann veit, at fráferðir eru úr Føroyum niður til Evropa fríggjakvøld.

– Men tær eru úr Havn. Tí má allur farmur úr Suðuroy til Havnar fyrst og tað er júst hetta, sum er tann størsti trupulleikin hjá fiskivinnuni í Suðuroy. Tað leggur ein eyka kostnað á hana, sum virki norðanfyri ikki hava og tað ger eisini, at fiskurin verður ikki so góður.

– Hetta er ein kappingaravlagandi støða, sum er ein sera stórur vansi hjá vinnulívinum í Suðuroy. Tí er hetta ein vansi, sum má beinast av vegnum fyri at geva virkjum í Suðuroy javnbjóðis kappingarstøðu við virkini norðanfjørðs.

Og tað einasta rætta er at sigla beinleiðis úr Suðuroy niður á meginlandið fríggjakvøld, sigur Jákup Joensen.

– Fáa vit beinleiðis flutning úr Suðuroy niður á meginlandið, eru fortreytirnar fyri fiskivinnu í Suðuroy heilt øðrvísi og betri, enn tær hava verið, sigur Jákup Joensen.

Tað hevur verið nevnt, at farmaskipið, sum gøtumenn hava keypt, fer at sigla beinleiðis úr Suðuroy niður meginlandið týskvøld.

Men tað hóvar Jákupi Joensen illa.

– Ein beinleiðis ferð úr Suðuroy niður á Meginlandið í Evropa skal fara úr Suðuroy fríggjakvøld, sigur Jákup Joensen.